UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **29. september 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-81**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 21/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, um undirvísingartilfar til orðblind, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at ikki nóg nógv og nóg gott tilfar á føroyskum er í m.a. náttúrulærugreinum til fólk við lesitrupulleikum?
2. Hvat verður gjørt fyri at skipa so fyri, at gott og egnað tilfar er tøkt til fólk við lesitrupulleikum?
3. Nær kann væntast, at tilfar til orðblind og fólk við lesitrupulleikum er teldutøkt, so tað er lætt at finna fram og brúka í undirvísing?

Svar

Svar til 1: Nakað av føroyskum tilfari til næmingar er teldutøkt. Allar ljóðbøkur hjá Námi liggja sum ljóðfílur á Snar.fo ella eru flættaðar inn í i-bøkur og s-bøkur.

Tá ið umræður ljóðbøkur í náttúrulærugreinunum, eru 15 ljóðbøkur tøkar (https://snar.fo/ljodbokur)
Nakrar ljóðbøkur vanta og nakrar eru í gerð.

Undirvísingartilfar hjá Námi:

Lærugrein	Ljóðbók	Manglar ljóðbók
Landafrøði	Landafrøði 1 Landafrøði 2 Landafrøði 3	
Lívfrøði	Lívfrøði til 7. fl. Lívfrøði 2 Lívfrøði 3	
Alisfrøði og evnafrøði	Alisfrøði og evnafrøði 1 Alisfrøði og evnafrøði 2 Alisfrøði og evnafrøði 3	
Náttúra og tøkni	Náttúra og tøkni 2 Náttura og tøkni 3	Náttúra og tøkni 1
Støddfrøði	Skygni 5 Skygni 6 Skygni 8	Skygni 1 Skygni 2 Skygni 3

	Skygni 9	Skygni 4 * Skygni 7 Skygni 10 • Skygni 4 er ávegis – hinar verða ikki innlisnar Rokning 1. -> 7. Fl.

Í náttúrulærugreinunum eru vanligar ljóðbøkur ikki nøktandi. Tí er hvør einstøk ljóðbók pettað sundur í stutt ljóðbrot, ið eru hóskandi til brotini um evnið í bókini. Hetta merkir, at næmingurin má hava bæði ljóðfíluna og prentaðu bókina.

Nám hevur eisini gjørt teldutøkar bøkur (i-bøkur) í samstarvi við danskar undirvísingarportalar; Alinea, tá tað snýr seg um fólkaskúlanæmingar og forlagið Systime, tá um miðnámsskúlanæmingar umræður. Á hesum platformunum fáa næmingarnir bókina fram á telduni, umframt ljóðbrotini til tekstin í einum og sama miðli (portali). Henda loysnin er góð fyri orðblinda næmingin. Tað hava verið og eru framvegis tekniskar avbjóðingar við hesum loysnum.

Svar til 2: Umframt at gera ljóðbøkur, ger Nám eisini teldutøkt tilfar við i-bókum og s-bókum (samvirknum) til bæði fólkaskúla og miðnám.

Umframt ljóðbókamøguleikan í i-bókunum, fer Nám meira og meira at nýta undirvísingarportalar, har videobrot eisini verða knýtt at teldutøku bókini. Á miðnámsøkinum hevur Nám eisini fleiri s-bøkur (samvirknar), har ímillum eina støddfrøðisbók.

Tað stendur skúlunum í boði at keypa hald til i-bøkur til orðblindanæmingar frá Námi, uttan at keypa hald til heil flokssett.

Leggjast kann afturat, at verkætlanin Ravnur (føroysk teldutala) er ávegis. Her er talan um eitt annað amboð, sum eisini kann gerast ein hjálp hjá orðblindum, tá tað snýr seg um at brúka talu til tekst. Í skúlahøpi kann teldutalan verða hent hjá orðblindum í sambandi við t.d. at skriva stíl og skriva niður (notera).

Svar til 3: Teldutøkar loysnir eru tøkar í dag. Tá umræður ljóðtilfarið til nýggju bókarøðina Rokning, kann væntast, at hon verður tøk til skúlaársbyrjan 2021/2022, umframt annað tilfar í t.d. Lívfrøði og Náttúru og Tøkni. Ljóðbókastænastan á Landsbókasavninum framleiðir ein part av undirvísingartilfarinum fyri Nám.

Harafturat kann upplýsast, at Landsbókasavnið arbeiðir við at fyrireika ein ljóðbókaportal, har føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur verða atkomuligar á netinum. Arbeitt hevur verið við at gera dátugrunn, talgilda, ljóðviðgerða og leggja um tær 500 føroysku ljóðbøkurnar, so tær eru egnaðar at leggja út á komandi ljóðportalin. Arbeiðið er komið væl ávegis, men enn vantar nakað í, m.a. skulu avtalur gerast við upphavsrættindahavarar og við veitara av tøkniligum palli.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo